**Skjal J**

**From:** Birita Johansen <birita@industry.fo>
**Sent:** Monday, November 19, 2018 9:03 AM
**To:** Høgni Joensen <hognij@logting.fo>
**Subject:** Uppfylging til fundin hósdagin

Til fíggjarnevndina:

Góðan dagin

Ferðavinnufelagið takkar fyri ein góðan hósdagin.

Í stuttum heldur felagið ikki, at Fíggjarmálaráðið hevur hugsað um, at hetta uppskotið fær nakra ávirkan á ferðavinnuna, tá ið uppskotið varð orðað.

Ávirkanin á ferðavinnuna við hesum uppskotinum er stór, og vinningurin, eyðmerktur í uppskotinum, hevði heldur verið eitt tap, tá ið samanum kemur.

Bilaleiga er ein týdningarmikil vøra í ferðavinnuni, og um skipanin í dag verður missbrúkt av summum, so stuðlar ferðavinnufelagið sjálvsagt, at lógin verður tillagað, soleiðis at hon ikki kann misnýtast. Í tí sambandi mælir felagið staðiliga til, at treytir verða settar til kilometurtal, og at talið av leigumálum verður hert, heldur enn at avtaka núverandi skipan, sum hetta uppskotið leggur upp til.

Sum vit vístu til á fundinum, er tað av alstórum týdningi, at ein avgerð verður tikin sum skjótast, tí hetta uppskotið liggur í buktini fyri søluna fyri 2019, ið er fult í gongd.

**Vinaliga/Best Regards**

Birita Johansen, ráðgevi/adviser

---

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

**Vinnuhúsið / House of Industry**
Phone: +298 309900 · Cell phone: +298 739911
birita@industry.fo - www.northatlantic-islands.com - www.industry.fo